UTTAN ÚR HEIMI

## Ætla at gera nýggj kjarnorkuvápn

Amerikanski avdubbingarfelagsskapurin Los Alamos Study Group vil vera við, at verjumálaráðið í Washington umhugsar at gera smáar kjarnorkubumbur, sum serliga skulu nýtast ímóti herstøðum undir jørð.

Felagsskapurin vil ikki siga, hvaðani hann hevur tíðindini, men eygleiðarar í USA halda, at tey eru úr skjølum frá einum fundi í verjumálaráðnum tann 10. januar. Í einari frásøgn frá fundinum stendur, at í august er ætlanin at umrøða, hvussu tey smáu kjarnorkuvápnini skulu gerast, hvussu tey skulu roynast, og hvussu stjórnin skal bera seg at fyri at fáa Kongressina og amrikanska fólkið at taka undir við, at tey verða gjørd.

Ein talskvinna hjá verjumálaráðnum vildi í gjár ikki gera viðmerkingar til tíðindini hjá Los Alamos Study Group. Eygleiðarar í Washington siga, at tíðindini koma George W. Bush, forseta, illa við, tí fleiri amerikanarar eru farnir at stúra fyri, at USA kanska fer at nýta kjarnorkuvápn í einum komandi kríggi.

## Andstøðufólk myrd

Tríggir hermenn og ein kvinna, sum tóku lut í drúgvu mótmælistiltøkunum ímóti forsetanum í Venesuela, Hugo Chavez, eru funnin myrd. Tey fýra fólkini vórðu fyrst burturflutt og bakbundin, áðrenn tey vórðu avrættað.

Løgreglan vil ikki siga, hví tey fýra fólkini vórðu burturflutt og myrd, ella um myndugleikarnir hava illgruna um, hvør kann hava framt brotsgerðina. Tíðindi úr Venesuela siga, at ein 14 ára gomul genta sá, tá í hvussu er eitt av teimum fýra varð avrættað. Sambært tíðindunum liggur gentan á einum sjúkrahúsi, og sagt verður, at løgreglan hevur tosað við hana um tilburðin.

Beint eftir at løgreglan hevði almannakunngjørt, at hon hevði funnið fýra lík, kunngjørdi Amerikanski Eindarfelagsskapurin OAS, at Hugo Chavez, forseti og andstøðan í venesuela vóru komin á samt um at binda frið.

## Kavaódn kravt nógv mannalív

Rættiligur stórkavi hevur verið á amerikansku eysturstrondini seinastu dagarnar, og nógvastaðni er so nógvur kavi komin niður, at fólk vita ikki frá slíkum at siga.

Í New York er kavin umleið ein hálvan metur tjúkkur, men aðrastaðni er nógv verri. Í statinum Maryland siga myndugleikarnir, at har kom so nógvur kavi niður, at eftir bert fáum tímum var kavin á vegunum meiri enn ein metur tjúkkur. Myndugleikarnir siga, at í minsta lagi 28 fólk eru deyð í kavaódnini. Í býum sum New York og Washington hava myndugleikarnir stongt skúlar og skrivstovur, og ferðslan hevur verið illa darvað av tí nógva kavanum.

Sum vant gera amerikanarar alt upp í pengum. Hesaferð hevur borgarstjórin í New York sagt, at hvør sentimetur av kava kostar býnum sjey milliónir krónur.

## 30.000 flýggja

Seinastu vikuna hava harðir bardagar verið í vesturafrikanska landinum Liberia, og altjóða hjálparfelagsskapir siga, at í minsta lagi 30.000 fólk eru flýdd undan bardøgunum.

Flóttafólkastovnurin hjá ST, UNHCR, sigur, at tey flestu flóttafólkini eru flýdd til høvuðsstaðin Monrovia, men at eini 6.000 fólk eru flýdd av landinum og hava leitað sær skjól í grannalandinum Sierra Leone.

Borgarakríggj hevur verið í Liberia í tvey ár millum andstøðuherin LURD og herin hjá Charles Taylor, forseta. Fyri nøkrum døgum síðani stóðu uppreistrarmenninir bert tólv kilometrar uttan fyri høvuðsstaðin.

# Blóðugt ísraelskt álop



*Ein av teimum palestinunum, sum vórðu særdir í ísraelska álopinum gjáranáttina, fær her hjálp á einum sjúkrahúsi*

*Mynd: Reuters*

**Ellivu palestinar lótu lív, tá ísraelskir hermenn við stríðsvognum og tyrlum lupu á mál í og kring Gaza bý**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen*

Tann vápnaði palestinski felagsskapurin Islamskt Heilagt Kríggj hevur nógvar viðhaldsmenn í Gaza býi, og sagt verður, at nógvir palestinar runnu út á gøturnar við maskinbyrsum og heimagjørdum rakettum, tá ísraelsku hermenninir lupu á gjáranáttina.

Tríggir palestinskir fregnartænastuyvirmenn doyðu, og fimm løgreglumenn vórðu søærdir, tá ísraelskar stríðstyrlur skutu rakettir eftir einari støð hjá palestinsku trygdarmyndugleikunum tætt við Shajaiyeh eystan fyri sjálvan Gaza bý.

Í grannabygdini Tufah norðan fyri Gaza bý doyðu minst fýra palestinar, teirra millum tveir løgreglumenn, tá ísraelski herurin søkti at har. Sagt verður, at umleið 20 palestinar vórðu særdir í hesum økinum, sum vanliga verður hildið at vera eitt av teimum sterku økjunum hjá felagsskapinum Fatah.

Eina aðrastaðni doyðu tríggir palestinar, tá ísraelæskir hermenn sprongdu ein bygning í luftina.

Ísraelska herleiðslan vildi ikki gera viðmerkingar til álopið í Gaza gjáranáttina, men ein kelda í verjuleiðsluni segði fyri fjølmiðlum, at endamálið við álopinum var at órógva samskiftið millum teir palestinsku yvirgangsfelagsskapirnar.

# Bush boðin til Noregs

**Amerikanski forsetin fer ætlandi at vitja í Noregi í mei, men hann skal ikki vænta sær nakra góða móttøku**

FORSETAVITJAN

*Árni Joensen*

Uttanríkisráðið í oslo váttaði í gjár, at George W. Bush, forseti er boðin til Noregs at vitja seint í mei mánað, og at arbeitt verður við at leggja ferðina til rættis. Nær ferðin verður, er ikki endaliga avgjørt enn, men sambært uttanríkisráðnum skal Bush hitta Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharra og aðrar politikarar. Hann skal eisini vitja kongshúsið.

Men tað er longu nú greitt, at amerikanski forsetin fær ikki ta bestu móttøkuna, tekur hann av innbjóðingini at koma til Oslo. Norskir felagsskapir, sum eru ímóti amerikansku ætlanini at leypa á Irak, hava longu boðað frá, at teir fara at skipa fyri mótmælum, kemur Bush til Noregs. Ætlanin er at skipa fyri mótmælum í Gardermoen-floghavnini, tá flogfarið við forsetanum kemur hagar, og ætlanin er eisini at mótmæla í sjálvum Oslo.

Seinasta leygardag gingu umleið 100.000 norðmenn mótmælisgongu ímóti amerikansku krígsætlanini.







STEPHANSSONS HÚS

957341047

...ljóðar so lystiliga í okkara nýggja bygningi, tá ið pakkarnir fara fram við strikukotunum. Tað er ein framkomin bygningur við øllum teimum nýggjastu hentleikunum á goymsluøkinum, vit bjóða fram. Stórur dentur er lagdur á góðsku, soleiðis at Eimskip kann bjóða sínum viðskiftafólki eina nýmótans vøruhandfaring.
Vælkomin til Eimskip á Skansabryggjuni, tlf. 347000, www.eimskip.fo.

* Varan stendur ongantíð úti í regni og vindi.
* Tørvar tær goymslupláss, ber nútt til at leiga seg inn í pakkhúsbygningin.
* Goymslustýring á vøruhotellinum er eisini ein nýggj tænasta.
* Fært tú eina sending til landið, leggur tú hana í vøruhotellið.

GREIÐ LEIÐ. EIMSKIP

Tá ið brúk er fyri vøruni, koyra vit hana á rætta stað, ein part nú og annan tá.
* Frígoymsla, ein nýggj tænasta, har varan kann goymast ótollað í upp til 3 ár, til hon verður tikin út eftir tørvi. Varan kann sendast av landinum aftur ótollað, um ikki er brúk fyri henni.